## Heilafelagið 12 ár heiladagin

10. mai er heiladagur, og tað er eisini ársdagurin hjá Heilafelagnum, sum er áhugafelag fyri fólk við heilaskaða (apopleksi og afasi). Í sambandivið dagin verður Heilafelagið á torginum í SMS leygardagin 9. mai frá kl 10.00 til 16.00 har ymisk tiltøk verða m.a. verður høvi hjá vitjandi at fáa mált blóðtryst. Lutaseðil kann keypast, vinningurin er cruiseferð við Norrønu til Ísland fyri tvey ferðandi. Vinningurin verður drigin kl 16.00. Kl 13.00 fer Jógvan Telling at framføra á pallinum (Jógvan var sjálvur raktur av blóðtøppi fyri nøkrum árum síðani). Kl 14.00 fer gospelkórið »Tensing« at framføra nakrar sangir (í kórinum luttaka sangarar, sum hava avvarðandi, íð bleiv raktur av blóðtøppi). Sunnudagin 10. mai eru limir og onnur áhugað vælkomin út í MBF húsið frá kl 15.00 til 17.00 til ein drekkamunn. Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum kemur at vitja, sigur Heilafelagið.




## Kend skipasmiðja gevst

Eftir áhaldandi stríð við býráðið í Fredericia hevur leiðslan á skipasmiðjuni í býnum gjørt av at gevast við virkseminum. Í einari fráboðan í gjár skrivaði stjórin, Thomas Andersen, at tað er nyttuleyst at halda fram, og at hann tí hevur gjørt av at gevast við virkseminum. Býráðið í Fredericia hevur gjørt av, at skipasmiðjan skal flytast til eitt annað stað við havnarlagið, men tað vil eigarin ikki. Uffe Steiner Jensen, borgarstjóri í Fredericia, sigur við TV2, at kravið frá býráðnum um, at skipasmiðjan skal flyta, er endaligt. Hann sigur seg harmast avgerðina hjá felagnum at gevast.

# Almennu Føroyar eina milliard í halli




*Jóannes Eidesgaard hevur sigur, at tað er neyðugt at hava ís í búkinum og at geva tol til ein semja er um, hvørji tiltøk skulu setast í verk fyri at fáa búskapin aftur á beint*

**Tilsamans koma føroysku kommunurnar at hava yvir 130 milliónir í halli í ár og saman við hallinum á fíggjarlógini hjá landinum, verður hallið hjá almennu Føroyum sostatt eina heila milliard í ár**

**BÚSKAPUR**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Kommunurnar í Føroyum koma í ár at hava eitt hall upp á yvir 130 milliónir krónur.

Tað upplýsti Jóannes Eidesgaard í Løgtinginum í gjár.

Hann upplýsti eisini, at hóast samgongan hevur væntað eitt hall á fíggjarlógini upp á 500 milliónir, vísa nýggjast metingarnar, at inntøkurnar verða góðar 220 milliónir minni, enn roknað var við á fíggjarlógini fyri í ár

Sostatt er tað nú alt sum bendir á, at tilsamans verður hallið hjá almennu Føroyum upp ímóti einari heilari milliard.

### 12 kommunur vil halli

Tað vóru tjóðveldisfólkini Høgni Hoydal og Annita á Fríðriksmørk, sum vildu hava upplýsingar frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum um búskaparligu støðuna hjá landi og kommunum.

Jóannes Eidesgaard sigur at tað eru 12 kommunur, sum koma at hava hall á fíggjarætlanunum í ár, men tær flestu av teimum eru smáar kommunur, sum ikki rúgva nógv upp í samlaða búskapinum.

Men av teimum stóru kommununum eru tað serliga nakrar heilt fáar, sum koma at tyngja fíggjarstøðuna í kommunala geiranum illa.

Tær eru Tórshavnar Kommuna, sum fær eitt hall upp á 105 milliónir í halli á fíggjarætlanini fyri í ár, Vága kommuna, sum fær 21 milliónir í halli og Sjóvar Kommuna, sum fær 14,2 milliónir í halli.

Hinvegin vísti landsstýrismaðurin á, at nýggjastu metingarnar vísa, at inntøkurnar verða lægri enn mett varð á fíggjarlógini og tí fer hallið uttan iva at verða nakað størri.

### Sjey undantaksloyvi

Eftir lógini kann ongin kommuna skylda meiri enn eina álíkning, men landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sigur, at seinastu fýra árini hava sjey kommunur fingið undantaksloyvi til at veksa lánini upp um eina álíkning.

Tær eru Sandoyar Kommuna, sum tvær ferðir hevur fingið undantaksloyvi til at hækka skuldina upp um eina álíkning. Hann nevndi, at ein orsøk til hetta er, at kommunan hevur bygt út og ein onnur orsøk er, at Sands Kommuna ikki hevur fingið tann stuðul frá mentamálaráðnum, sum tey høvdu væntað sær til listasavnið.

Annars er talan um Vágs, Hovs-, Tvøroyrar-, Skopunar-, Klaksvíkar- og Vestmanna Kommuna, sum hava fingið undantaksloyvi til at hækka skuldina upp um eina álíkning.

Treytin fyri undantaksloyvinum hevur sum oftast verið, at talan skuldi vera um at umfíggja skuld og at skuldin skuldi vera komin niður á eina álíkning í 2010.

- Tað má tíverri staðfestast, at meginparturin av hava kommununum hava ikki hildið hesar treytir og tí eru omanfyri álíkningina, staðfesti landsstýrismaðurin í fíggjarmálum

Tað var hann avgjørt ikki nøgdur við.

Hann staðfesti eisini, at fíggjarmálaráðið hevði ikki neyðugu amboðini til at stýra kommunubúskapinum neyvari.

Hann eftirlýsti einum slíkum stýringsamboði og hann kundi hugsa sær, at lógarverk verður gjørt á økinum fyri at hava tamarhald á búskapinum hjá kommunum, tí vit upplliva, at tað eru ávísar kommunur, ferð eftir ferð stýra seg út á sjógv,.

Annars endurtók hann enn einaferð, at hann er opin fyri einum kjaki um at sanera toppin av skuldini hjá teimum mest skuldarbundnu kommununum.

- Hetta høga ting hevur sanerað bæði vinnulív og bankar fyri milliardir og eg havi nógv reinari samvitsku av at sanera toppin av kommunuskuldini, so at tað verður livandi hjá fólki enn av teimum saneringum, sum eru gjørdar í vinnulívinum, legði hann afturat.

Hann vísti á, at nú inntøkan svíkur, lækkar álíkningin samstundis og sostatt er skjótari at koma upp undir lániloftið og tað setir fleiri kommunur í eina rættiliga tórføra støðu.

### Høgni tvingaði Kirkjubø

Í løgtinginum átók Høgni Hoydal sær annars heiðurin av, at Kirkjubøar Kommuna var endað uppi í Tórshavnar Kommunu.

Hann segði, at tá ið hann var landsstýrismaður í kommunumálum, noktaði hann blankt Kirkjubøar kommunu at økja skuldina upp um eina álíkning fyri at fáa ráð til at byggja barnagarð.

- Tað var orsøkin til, at Kirkjubøar Kommuna fór upp í Tórshavnar Kommuna, staðfesti tjóðveldismaðurin.

### Kaldur landsstýrismaður

Jóannes Eidesgaard kom annars undir trýst tí at samgongan enn ikki hevur tikið nóg munagóð stig til at fáa búskapin aftur á beint.

Men Jóannes Eidesgaard helt ikki, at tað var so avgerðandi um útspælið frá samgonguni kemur nú alla í næsta mánaði.

Hann segði, at talan er um tórførar spurningar, sum máttu viðgerast væl og virðiliga.

Hann ávaraði ímóti at leypa framav. Tvørtur ímóti tvíhelt hann um, at tað ræður um at hava ís í búkinum og hava tol til at finna semju ímillum tríggjar ymsar flokkar við 20 ymsum tingfólkum, umframt at andstøðan skuldi takast við upp á ráð.

Hinvegin ásannaði ásannaði hann, at tað neyðugt við bygnaðarligari høvuðsreingerð í almenna búskapinum, sum hava bíðað í 15-20 ár og tað verður ómetaliga tórført, tí flokkarnir eru ógvuliga eymir um ymisk viðurskifti.